# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Avgerð um ES hastar

Johan Dahl, løgtingsmaður hevur í lesarabrævi at løgmanni og mælir løgmanni til at taka tríggjar politiskar avgerðir her og nú, nevniliga at sleppa øllum yvirtøkunum, at fáa tey málsøki, ið eru yvirtikin at fungera, og í triðja lagi at seta ES málið á dagskrá. Tað er avgerandi fyri framtíðarmøguleikar okkara sum framkomið samfelag at finna saman um loysn á ES avbjóðingini, sum hann málber seg.

Tað má ásannast, at Johan Dahl nemur við trý øki, sum í sjálvum sær hava stóran politiskan týdning og stóran áhuga millum manna. Vit skulu hefta okkum eitt sindur við ES málið. Søguliga hevur ES málið havt eina løgna lagnu í føroyskum politikki. Hetta er eitt mál, har sakligar grundgevingar móti limaskapi hava verið blandaðar við sterkar kenslur í stórum pørtum av fólkinum. Sakliga andstøðan móti ES var í síni tíð grundað á ein sterkan ótta fyri fiskivinnupolitikkinum hjá Felagsmarknaðinum, sum ES nevndist. Væl skiljandi, tí einhvør dugdi at síggja, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES ikki kundi sameinast við føroysk fiskivinnuáhugamál. Henda støða hjá løgtingi og landsstýri var sostatt undir tágaldandi umstøðum skilagóð. Tá tað samstundis eydnaðist føroyingum, fyrst og fremst Atla Dam fyri at takka, at fáa góðar avtalur við ES, so fingu Føroyar bara heilt væl burturúr eini truplari marknaðarstøðu.

Men við tíðini er ES sera nógv broytt innihaldsliga so væl sum formliga. Hetta er alkunnugt og eingin orsøk er at fara í smálutir við broytingunum. Tó kann vera nevnt, at ES nú fevnir um so nógv annað enn búskaparligt samstarv og at ES reint politiskt hevur flutt seg ómetaliga langt frá at vera ein skipan, ið mestsum bert hevði til endamáls at bjarga europeisku kapitalismuni til eitt veruligt og sera nútímans samveldi av sjálvstøðugum londum. ES leggur nú sera stóran dent á menning, altjóða samstarv, umhvørvi, granskingar- og útbúgvingarsamstarv, fólkaræði, javnstøðu, brúkaramál, mannarættindi og menningarhjálp og humaniter grundsjónarmið yvirhøvur. Talan er við øðrum orðum um altjóða samgongu, sum flestøll vestureuropeisk lond vilja sleppa uppí og sum øll lond vilja samstarva og handla við. Tað er tí sjálvsagt, at løgting og landsstýri mugu hava púra greið politisk mál fyri okkara viðurskifti við ES. Vit hava ómetaliga nógv at samstarva við ES um, tí hevur ein avgerð um framtíðar ES politikkin sera stóran skund. Ein slík avgerð krevur nógvar umhugsingar og kanningar, ið eiga at fevna um allar hugsandi møguleikar.

**Sosialurin**

## Hava hug at flyta av landinum

**DÁVID ISFELD**



Mangt er at hoyra í tíðindunum og ymiskum kjaki gjøgnum dagin, men lítið verður gjørt burtur úr tí trupuleika, sum møguliga kann vísa seg at gerast ein katastrofa. Tá eg tosi við fólk síðst í 20 árunum og í 30 árunum, hoyri eg fleiri av teimum siga seg vera ónøgd við at búgva í Føroyum eftir lokna útbúgving, og siga seg eisini vera sera vónbrotin av vantandi politiskum vilja til at bøta um korini hjá hesum fíggjarligt strongdu fólkum. Hetta eru fólk, eins og eg sjálvur, sum hava fingið sær útbúgving og eru komin heim við lestrarláni í viðføringum. Komin til Føroyar keypur ein hús og bil og setur seg soleiðis í stóra skuld – hetta er heilt vanligt og er heldur einki galið í tí.

**Ov dýrt at liva í Føroyum**

Tað, sum er galið er, at tað er ov dýrt at liva í Føroyum, um ein hevur familju. Bara at gjalda fyri tað mest neyðuga og vanliga sum t. d. mat, klæðir, barnansing, telefon, húsarhaldstól o.t., er ov dýrt (t.d. má eg tjena 7000 kr um mánan til barnaansing, 2 børn). Nú eg havi lisið í Keypmannahavn, veit eg av tí sama mest um prísstøðið í Danmark, og vil eg tí tosa við støðið í hesum prísum.

Næstan øll lýsingabløð vit fáa í postkassan eru donsk, sum bert eru umsett til føroyskt, meðan umsetingin av prísinum er ein hækking upp á eini 20-25%. Her er talan um næstan allar gerandisvørur frá mati og klæðum til steintøj og el-tól. Vit mugu sostatt gjalda 20-25% meira fyri somu vørurnar sum danskarir skulu, og teir hava enntá hægri lønir enn vit hava her í Føroyum. Altso: vit tjena minni pengar og gjalda meira fyri somu vørur sum danskarir. Er tað nakað at siga til, at teir ungu og ný-útbúnu føroyingarnir vera verandi í Danmark ella flyta niður aftur til Danmarkar ella til onnur lond at búgva?

**Barnafamilju exodus er trygg gongd móti avfólking**

Familjan dregur meginpartin av hesum unga fólki heimaftur; men tú kanst ikki eta familjukærleika ella gjalda rokningar við honum – hesar treytir eru eisini galdandi fyri fosturlandskærleika. Sum ein tjóðskaparligur og heimkærur maður hevði eg forsvorið, at eg í álvara fór at fáa hug at flyta av hesum oyggjum eg havi so kærar (fái kensluna av at hava ein knýttan neva í hálsinum bert av at skriva hetta). Men sum uppihaldarar av fleiri børnum hava vit foreldur, sum nýliga eru heimkomin, sera tunga gongd her á landi. Barnagarðarspláss átti at verið bíligari t.d. við stuðli/frádrotti, skatturin átti at verið lægri, so vit hava meira pengar til okkum sjálvi – og ikki til tunlar – og MVG'ið átti at verið tikið av neyðsynjarmatvørum. Hetta kundi verið ein byrjan upp á trivnaðin. Annars kann tað unga fólkið skjótt hálverast í tali, og um slík gongd kemur á, kann tað enda við nøkrum, ið mest vil líkjast einari avfólking yvir 50 ár (hvørja nyttu gera tunlarnir tá?). Tað hevði verið ein stór skomm fyri føroyskar politikarar og ein katastrofa fyri Føroyar.

**Verulig og munandi hjálp til barnafamiljur – IKKI tunlar**

Øll fólk klára eina tunga tíð, sum tey uml. 5-6 árini vit eru í lestrarørindum, tí vit vita tað hevur ein enda í nærmastu framtíð; men tá vit her heima, við skuld upp um bæði oyru, síggja raðfestingarnar hjá politikarunum, serstakliga undirsjóvartunlarnir fyri 2 miljardir, síggja vit ongan peningaligan lætta fyri framman, meðan vit mugu stríðast fyri hvønn bita og hvønn lut – hóast fulltíðarstarv – og gloym alt um at fara at ferðast tey næstu 10-15 árini (øll vita hvussu dýrt tað er at ferðast úr Føroyum). Hví í ólukkan skulu vit ungu, evnaríku, orkuríku og vanliga lívsglaðu foreldur við góðari og nýggjari útbúgving tíma at uppala okkara børn á hesum ov ofta køldu, vátu og stormherjaðu oyggjum? Kundu vit fari at ferðast einaferð um árið ella bara annað hvørt ár til heitari lond, so hevði tað gjørt mun, men... Ja, hetta gjørdist eitt hjartasuff at enda, men hvat hjálpir? Hvat skal til fyri at vekja ans hjá politikarunum, so vit kunnu fáa eitt gott familjulív? Skal ovur dýrur lokalpolitikkur oyða trivnaðin hjá barnafamiljum? Tað er í øllum førum tey árin, politikararnir góðtaka í løtuni. Eru vit veruliga noydd at ríma av landinum fyri at liva betur?

## Brævdúgvan missir flogið

**SANDS KOMMUNA**
Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri



Er endamálið at skerja brævdúgvuna, so hon missir flogið og harvið borgaran úr eygsjón?

Vit sóu tað við Farmaleiðum. Vit síggja tað við Bygdaleiðum. Heldur enn strategiskar broytingar í samráð við fólkið, so verður salamiuppskriftin nýtt fyri at niðurpína eina almenna tænastu, so hon at enda er á einum so vánaligum støði, at hon meira kennist sum haft um beinið á borgarunum, enn nakað annað. Vónandi verður hettar ikki støðan hjá Postverkinum.

Kann bara siga fyri Sands Kommunu, at tað kennist hugstoytt, nú vit royna at skipa eina handils- og tænastusinnaða miðbygd, mitt í Sandoynni, at hoyra at nýgjørda posthúsið skal roytast upp við rót úr vælskipaða tænastuumhvørvinum. Vónandi er hettar ein misskiljing, ið byggir á vantandi innlit í tað umhvørvi, sum vit við stríð og strev, against all odds, royna at fáa á føtur her á Sandi.

Fari tí bert at boða frá, at Sands Kommuna fegin vil dialogin við posthúsleiðsluna, í royndini at varðveita og menna posttænastuna her í nærumhvørvinum, og ivist eg onga løtu í, at henda tænasta saman við hinum tænastutilboðunum til borgaran, kann mennast enn meira, sum partur av einum tænastutyssi til gest, sum búgvandi borgara í Sandoynni.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.